*Oljufyrisitingin og allir stovnar, sum hava tilknýti til undirgrunda flyta skjótt í gamla landsbókasavnsbygningin. Mynd kalmar*

*Martin Heinesen, leiðari á Oljufyrisitingini:*

# Vónandi fara oljufeløg at vísa áhuga

*Tað ber ikki til at siga nakað um olju og gass við vissu við seismiskum kanningum aleina. Til tess er neyðugt við víðari kanningum og at enda boring. Vónandi fer tulkingin av tilfarinum at vera so góð, at oljufeløgini framhaldandi fara at vísa áhuga.*

-Tað hevur gingið nakað seinni enn ætlað, men slíkt tilfar er sera ringt at hava við at gera - ikki minst tá tú arbeiðir í øki við tjúkkum basaltfláum.

Hetta sigur Martin Heinesen, leiðari á oljufyritingini við Tíðindablaðið Sosialurin í sambandi við, at fyrstu viðgjørdu upptøkurnar hjá Western nú eru klárar.

Hann vísir avgjørdur aftur, at henda seinkanin hevur nakað at gera við, at teir ikki hava valt tað rætta felagið at taka sær av arbeiðinum.

-Vit valdu rætt, tá vit lótu Western gera hetta arbeiði. Teir hava havt ymsar trupulleikar við at viðgera tilfarið, ti tað er frá einum øki við rættuliga torførum umstøðum.

Annars er Martin Heinesen fegin um, at tað er komið so mikið væl áleiðis kortini og vónar hann, at okkurt meira fer at spyrjast burtur úr, nú oljufeløgini fara at hyggja eftir tilfarinum og tulka tað.

**Føroyingar fáa alt tilfarið**

Partur av avtaluni við Western sigur, at føroyingar skulu hava atgongd til alt tilfarið, sum Western hevur. Talan verður so um eitt ávíst samstarv í tulkingini millum nýggju arbeiðsstøðina á Oljufyrisitingini, sum Heri Ziska fer at hava leiðsluna av, síðani arbeiðsstøðina á DGU í Danmark, sum Lars Ole Boldreel fer at at standa fyri og at enda Judith Neish, sum landsstýrið hevur sett at vera ráðgevi í seismiskum spurningum. Hon hevur búgstað og arbeiði í Skotlandi.

Martin Heinesen hevur ikki sjálvur sæð tað lidna tilfarið frá Western, men hann veit tó so mikið, at tað ber væl til at siggja niður gjøgnum tjúkku basaltfláirnar í støðum og har við finna fram til, hvør strukturur er í undirgrundini og um nakað bendir á, um tað kundi verið áhugavert at leita víðari.

Endamálið við tulkingini av tí seismiska tilfarinum er nettup at finna fram til, um ráðiligt er at brúka pengar til víðari kanningar eitt nú 3D seismikk og boring.

Martin Heinesen vísir á, at fólk mugu ikki trúgva, at tulking av seismiskum tilfari ber og nú sigur nakað um olju. Her kann koma so nógv annað upp í.

**Seismikkur ikki altíð eftirfarandi**

Martin greiðir frá, at tá feløgini fóru undir at bora eftir olju vestan fyri Hetland høvdu tey eisini seismisk kanningarúrslit at ganga eftir. Har leitaðu teir í mong ár í teimum eldri løgunum eins og gjørt varð í Norðsjónum. Men har varð einki funnið.

Sama varð gjørt, tá farið varð at bora longur vesturi, har teir funnu Foinaven kelduna. Tað var meðan teir boraðu niður í tey eldri løgini, at teir av tilvild raktu við hesa stóru kelduna í teimum yngru løgunum.

Hetta vísir, hvussu svikaligt alt er, tá talan er um at leita eftir olju. Einki er víst og givið fyrr enn tú hevur borað. Og tí kanst tú heldur ikki við 100% vissu siga nakað um olju út frá seismiskum upptøkum. Men fyrr fara út í eina stóru íløgu í boring, so vilja oljufeløgini hava okkurt at ganga eftir.

-Eg vóni bert, at tulkingin av tí seismiska tilfarinum verður so mikið áhugaverd og vælevdnað, at oljufeløgini framhaldandi fara at trúgva, at tað er vert at halda fram og brúka fleiri pengar til víðari kanningar.

**Vaksandi stovnur**

Annars er stórt virksemi á Oljufyrisitingini og teimum stovnum, sum so ella so hava tilknýti til leitingina eftir olju.

Tað eru longu sett fleiri fólk, eitt nú ein jarðfrøðingur og ein løgfrøðingur, og í næstum verður so eisini ein búskaparfrøðingur settur.

Martin Heinesen sigur, at har er ov mikið at gera. Løgfrøðingurin Herálvur Joensen er í løtuni í ferð við at gera lógarkarmin fyri eitt nú lisensstreytir ol. saman við ráðleggingarnevndini. Bara lógararbeiðið í sambandi við eina komandi oljuvinnu er eitt sera stórt og kravmikið arbeiði.

Jarðfrøðingurin, sum varð settur í september í fjør, er Heri Ziska, sum hevur tikist við at tulka seismiskt tilfar.

Búskaparfrøðingurin, sum verður settur í næstum, fær eisini úr at gera. Martin Heinesen sigur, at tað er eins alneyðugt við einum búskaparfrøðingi sum løgfrøðingi og jarðfrøðingi.

Búskaparfrøðingurin og løgfrøðingurin koma so at arbeiða tætt saman, og tað, sum liggur næst, er at gera reglur fyri lisensum, tá oljufeløgini skulu undir at bora.

**Flyta í gamla landsbóksavnið**

Økta virksemi hjá oljufyrisiting, jarðfrøðissavni og øllum teimum, sum hava tilknýti til oljuleiting og undirgrund, setir størri krøv til hølisviðurskiftini, og tí er tað heldur eingin loyna, at øll hesi fólkini bíða við spenningi eftir at skula flyta í gamla landsbókssavnið, sum bert liggur nakrar metrar frá bátaneystinum, har oljufyrisitingin nú húsast.

Vónandi verður klárt at flyta 1. mai. Orsøkin til at brúk er fyri størri hølum er umframt tað økta virksemi eisini, at allir stovnarnir, sum arbeiða við undirgrundarmálinum helst skulu vera undir sama taki.

Her er talan um oljufyrisiting, jarðfrøðisavnið og DGU, um eini 10 fólk tilsamans.

Fyri at skilja samansetingina av stovnunum á Debesartrøð, so er vert at vita, at undir Náttúrugripasavninum eru tríggjar deildir: ein plantudeild, ein djóradeild og ein jarðfrøðideild.

Sjálv oljufyrisitingin er ein sjálvstøðugur almennur stovnur.

Hon hevur neyvt samstarv við jarðfrøðissavnið, ið

→

*Her húsast oljufólkini í løtuni, í syðra enda á bátaneystinum. Mynd kalmar*

*Martin Heinesen, leiðari á Oljufyrisitingini her umborð á Sea Star, tá teir høvdu gjørt tær fyrstu upptøkurnar klárar at senda til Bretlands. Mynd jan*

*Her á høvuðsstøðini hjá Western í London eru teir nú liðnir við teir fyrstu 1000 kilometrarnar av seismiskum tilfari, sum nú skal tulkast av oljufeløgum og øðrum. Heri Ziska arbeiddi her í fleiri mánaðir í fjør fyri at kunna seg við tilfarið og arbeiðsgongd.*

→

virkar sum eitt slag av arkivi hjá oljufyrisitingini.

Jarðfrøðissavnið hevur so eina samstarvsavtalu við Danmarks Geologiske Undersøgelser, DGU. Hetta samstarv hevur verið galdandi í mong ár og fer at halda fram nú eisini. DGU kemur tí at arbeiða tætt saman við oljufyrisitingini, men tað verður so gjøgnum jarðfrøðissavnið.

Jarðfrøðissavnið og DGU takast m.a. við at kanna alt tað stóra økið, sum Føroyar og Danmark gera krav upp á, tvs. bæði økið innan fyri 200 fjórðingar og tað uttanfyri. Argumentini hjá føroyingum fyri at fáa rættin til økini uttan fyri 200 fjórðingar eru, at tey eru náttúrlig longing av landgrunninum, og har eru jarðfrøðilig argument sera avgerandi fyri okkum. Í hesum sambandi tekur serliga DGU sær av einum projekti, sum nevnist Føroyar - Rockall projektið. Í stýrinunum eru tríggir føroyingar og 3 fólk frá DGU.

Hvussu verður í framtíðini viðvíkjandi plássi er so ein annar spurningur. Fer virksemið at økjast munandi, fara vit at finna olju og gass, so er greitt, at eisini gamla landsbóksavnið verður ov lítið hjá teimum mongu fólkunum, sum fara at arbeiða við hesum spurningum.

*Lars Boldreel, jarðfrøðingur á DGU, sum har fer at standa fyri tulkingini av seismikkupptøkunum í føroysku undirgrundini. Mynd kalmar*

**Lopra**

Umframt seismiskar kanningarnar við Føroyar verður eisini arbeitt við eini ætlan fyri kanningum á landi. Her verður serliga hugsað um Lopraholið.

Martin Heinesen sigur, at teir fara at brúka 1995 til at gera fyrireikingar. Møguleikarnir eru fleiri, eitt nú at bora longur niður í Lopra ella at bora eitt heilt nýtt hol onkra aðrastaðni. Eisini er møguleiki at gera seismiskar kanningar á landi við serstøkum vibratións akførum.

Her er oljufyrisitingin so ikki bundin av nøkrum ávísum felag. Møguleiki er at lata øðrum felag enn Western uppgávuna at gera slíkar kanningar og møguliga verður talan um eitt samstarv millum fleiri feløg. Longu nú hava fleiri stór oljufeløg víst áhuga fyri hesum.

Men tað fer at vísa seg í summar, um aðrar og hvørjar kanningar fara at verða gjørdar í 1996 eitt nú í Lopra.

jan

*Judith Neish, her umborð á Sea Star seinasta summar. Hon er ráðgevi hjá landsstýrinum í seismiskum spurningum og fer nú eisini undir tulkingina av tí fyrsta liðna tilfarinum. Mynd kalmar*


# VERKFRØÐINGUR
søkist
til
# Elfelagið SEV

Søkt verður eftir elektroverkfrøðingi við útbúgving innan sterkstreym.

**Starvið:**
Talan er um eitt komandi leiðarastarv á projekteringsdeildini. Bygnaðurin í SEV verður broyttur í næstum soleiðis, at projektering, nýgerð og rakstur verður skipað øðrvísi enn higartil. Projekteringsdeildin fer at fáa ábyrgdina av projektering av há- og lágspenningskervinum og eftirlit við hesum projektum. Eisini verður teknistovan partur av projekteringsdeildini.

**Útbúgving:**
Umsøkjarar skulu hava elektroverkfrøðisútbúgving við serligum atliti til sterkstreym.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjararnir hava royndir á nevnda starvsøki og hava evni – og helst eisini royndir í – at samstarva og leiða arbeiðið.

**Lønin:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála ímillum Føroya Landsstýri og Føroya Verkfrøðingafelag. Afturat sáttmálalønini verður veitt ein viðbót, sum verður ásett eftir starvsøki, ábyrgd, útbúgving v.m.

**Nærri upplýsingar** um starvið fáast við at venda sær til Klæmint Weihe, stjóra hjá SEV.

**Umsóknir:**
Umsókn skulu saman við prógvum og møguligum ummælum sendast til Elfelagið S.E.V., Postboks 319, 110 Tórshavn og skulu vera SEV í hendi innan 22. mars 1995.

**Elfelagið S.E.V.**



**TVINGSILSSØLA**
**Hósdagin**
**tann 23. mars 1995,**
**kl. 09.30**
verður á Sorinskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, tvingsilssøla av matr. nr. 677 c, Tórshavn, ið liggur **Hoyviksvegur 66, 100 Tórshavn A/S nr. 390/94.**

Talan er um ein virkisbygning í einari hædd við kjallara, ið nýttur hevur verið til dekksølu og -tænastu. Smb. tryggingarskjølum er kjallarahæddin 350 kvm, rúmhædd 300 kvm og ovara hæddin 300 kvm, rúmhædd 250 kvm. Á ovaru hædd er móttøka, dekklagurhøli, 5 skrivstovur, dekkverkstaður fyri persónbilar, avgreiðsluskrivstova, toilet, lítil tekøkur og kantina. Í kjallara er dekkverkstaður fyri lastbilar. Vanligar maskinur til dekktænastu eru í hølunum og fylgja við á tvingsilssøluni.

**Trupulleikar eru annars við tilkoyring til ognina, ið fer fram um grannagrund tilhoyrandi triðjamanni.**

Tvingsilssølan er umbiðin av Advokatfelagnum, Bryggjubakki 22, 100 Tórshavn, (j. nr. 9411006), og við at venda tygum til nevnda, kunnu tygum fáa nærri upplýsingar um ognina umframt avtala tíð fyri at siggja hesa.

Søluuppstilling yvir ognina kann verða umbiðin frá omanfyri nevnda advokati ella siggjast á Sorinskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 16. februar 1995*
Henrik Engell Rhod
dfm



## VIT KEYPA ØLL MASKINAMBOÐ

so sum Mobil-/beltikranar, gaffiltrukkar, last-biladumparar, brunnbátar og aðrar anleggsmaskinur umframt virkir.
Send tilboð á norskum/enskum v. myndum, avsendara, tlf. og nýtiligum faxnummari til:

**WEST MACHINE TRADING LTD**
P. O. Box 110 - 5090 Nyborg - Norge
Tlf. +47 55 56 01 50 ella fax +47 55 56 01 62



**SILD**
**til Klaksvíkar**

Sildin kemur friggjadagin.
Verður koyd til hús.
Bileggingar áðrenn kl. 15 hósdag.

**Sildargoymslan**
**Stoffalág 17**
**Tlf. 12355 (kl. 10-15)**



# Vøruvognur til sølu

**Mitsubishi diesel L 300** vøruvognur frá '87 til sølu fyri 30.000 kr.

**Tlf. 23237**